## DAGSINS MEINING

# Landsstýrið leggur upp til heitt vár

Tey flestu ásanna longu nú, at várið á føroyska arbeiðsmarknaðinum verður heitt. Nógvir sáttmálar ganga út í vár og í summar og nógvir eru sagdir upp. Enn eru krøv ikki sett fram - alment í hvussu er. Men øllum er greitt, at lønarkrøvini verða neyvan smá. Harafturat kann væntast, at onnur krøv verða til sáttmálarnar, sum nærum ikki eru broyttir í eini 10 ár.

So kunnu vit spyrja, hvussu landsstýrið hevur tæðað undan samráðingunum? Eisini kunu vit spyrja, um landsstýrið hevur sýnt, at tað lærdi nakað av seinastu samráðingunum, sum endaðu í einum longum verkfalli á almenna arbeiðsmarknaðinum?

Svarið er, at landsstýrið hevur helst einki lisið í sól og mána, og landsstýrið tykist einki at hava lært nakað av seinastu samráðingum.

Lønarspurningurin hongur næstan eina og aleina saman við, hvussu nógv fólk hevur at liva fyri. Tá føroyingurin rindar nógv í skatti og avgjøldum er lítið eftir. Tí økjast lønarkrøvini. Her skal einaferð afturat sláast fast, at samráðingar eru ikki spurningurin skatta- ella avgjaldslætta, men ein spurningurin um løn. Men tað skerst ikki burtur, at hevði samgongan sæð skriftina á vegginum og lækkað tað órímiliga høga skatta- og avgjaldstrýstið, høvdu lønarkørvini óivað verið lægri.

Veruleikin er tann, at hvørki láglønarfamiljur ella familjur við meðalinntøku fáa endarnar at røkka saman. Ráðini eru ikki til annað enn mat í munnin. Lítil og eingin peningur er til viðlíkahald, og tær flestu familjur mugu raðfesta, hvørjar rokningar skulu gjaldast henda mánaðin og hvørjar kunnu bíða til februar ella mars.

Nú í vetur var landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tvingaður til at lata ein skattalætta til láglønarbólkin, men hann er so lítil, at tað røkkur bara til ein hálvan oljutanga!

Taka vit so arbeiðsmarknaðarpolitikkin hjá landsstýrinum, so hevur landsstýrið tæðað væl fyri ósemju við at royna at fáa eina høvuðsavtalu, sum fakfeløg ikki vilja vit av, og ein arbeiðsrætt (les arbeiðsgevararætt) gjøgnum bakdyrnar!

Harafturat hevur landsstýrið ikki megnað at fáa eitt prístal tøkt til samráðingarnar. Tá fakfeløgini seinast vístu á, at reallønin var lækkað so og so nógv, svaraði landsstýroð aftur, at tølini vóru ikki haldgóð, tí vit høvdu ikki nakrar prístalsútrokningar. Ein prístalsútrokningarskipan skuldi gerast beinanvegin. Men hóast tey ár eru gingin, so er skipanin ikki liðug. Landsstýrið kann tí ikki fáa annað enn dumpikarakter!

Vit hava ikki ráð til verkføll og vit skuldu helst varðeitt okkara góða kappingarføri, men sitandi landsstýrið slóðar væl fyri ósemjum á arbeiðsmarknaðinum og kann koma okkara annars góða kappingarføri í vanda.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Minningarorð um Martin Jákup Strøm

føddur 30. august 1948 - deyður 18. desember 2000

Tá eg fekk boðini um, at tú ikki longur var í millum okkum, runnu nógvir tankar fram fyri meg. Fyrst um alt tað, sum Strøm familjan hevur verið ígjøgnum, um persónar, sum hava verið ryktir frá okkum inn í ævinleikan. So aftur nú, nu vóru boðini efitr tær.

Og vit lesa í Sálma 139,16: »Sum fostur sóu eygu tíni meg, og í bók tíni stóðu teir allir upskrivaðir, dagarnir, ið ásettir vóru, áðrenn nakar av teimum enn var komin«.

Fyri eini 10 árum síðani kom eg at kenna teg. Vit vóru staddir inni í uppihaldsstovuni á Sjómansheiminum í Havn, vit bíðaðu eftir bussinum, eg á veg norð til Norðdepils og tú til Oyndarfjarðar, til bátin hjá tær, »Suðuroy«, sum lá har, gjørdur klárur til at fara á Norðhavið.

Tað var lætt at koma í prát við teg, áhugamál okkara vóru tey somu. Tosað varð um útróðrarleiðir, og um umstøðurnar hjá útróðrarmonnum.

Serliga kom eg tær uppá nær hond í 1995. Tá var ágangurin á útróðurin viðvíkjandi kvotum so harður, at flestu bátar niðan fyri 20 tons sigldu til Havnar at vísa sína misnøgd.

Serliga hugsi eg um tá dagatal skuldi leggjast á útróðrarbátarnar, tá gjørdist tú oddamaður fyri útróðrarmenninar í Føroyum, og ikki varð helmað í fyrrenn umstøðurnar hjá útróðrarmonnum aftur komu í ordan, hetta hava vit tær at takka fyri, so eisini eftirkomararnir kunnu halda fram í hesum stætti.

Tú var so sera røkin maður, hetta sást eina best á báti tínum, sum tú sjálvur hevði gjørt. Báturin var fiskibátur burturav, men eisini en lystyacht, altíð so reinur bæði innan og uttan. Man føldi seg, sum at koma inn í eina stovu, tá man fór umborð til tín at drekka kaffi. Eg var eisini umborð á trolaranum, tú sigldi við, einaferð tit lógu á Klaksvík, har var á sama hátt eitt sera nosligt maskinrúm. Hetta lá alt so ræði fyri hjá tær, tí soleiðis vart tú av nátúr.

Siðani tá tosaðu vit altíð saman ofta tvær ferðir um mánaðin, seinast fjúrtan dagar áðrenn tú andaðist. Tú vart altíð hin sami frílynt maðurin hvussu so umstøðurnar vóru.



Føroyingar hava mist ein mann, ið vildi nakað vog serliga fyri tann meiniga mannin.

Hvat stendur so eftir, nú tá alt stríð er liðugt.

Tað er at hava vissa sær pláss heima há Gudi í ævinleikanum. Mangan tosaði tú um tað kvøldið í Havn, tá tú komst til hesa sannføring, at tað bert var við trúgv á Kristus, so áttu tú frið við Gud.

Orðatøkini 10,25 siga: »Tá ið stormurin kemur, er úti við hinum gudleysa, men hin rættvísi stendur á ævigari grund.«

Vit hava hjartans samkenslu við tykku, konu, børnum og systkjum og øllum sum stóðu tær nær.

Eina serliga heilsan tl mammuna, Louisu, sum hann var so hjartans góður við. Má Harrin geva tykkum ta styrki og troyst, sum skriftirnar geva. 2. Mósebók 23,20: »Eg sendi eingil undan tær, hann skal varða teg á ferðini og fylgja tær til staðið, ið Eg havi ætlað tær.«

Tøkk til tín, sum nýliga ert blivin skipari, og á veg frá kapellinum gav tú mammu Martin blómur og nøkur troystandi orð á ferðini. Má signing Guds fylgja tær.

Friður verið við minninum um Martin.

**Vinur tín**
**Martin**

---

†

Kunngjørt verður, at elskaði maður, pápi og abbi okkara,

**VALDEMAR POULSEN**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 6. januar, 60 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ásvør**

---

†

Leygardagin, trettandadag 6. januar tók Harrin kæru konu mína, mammu, vermóðir, ommu og langommu okkara

**Elmu Mortensen,**
á Argjum, 88 ár

heim til sín.

Kistan fer úr heiminum í kvøld kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Argja kirkju í morgin, mikudagin 10. januar kl. 13.00

Minningargáva kann latast til leguhúsið í Nesvík.

**Johannes, Gertrud, Ragnhild, Karin, Gudmund, Sólbjørg og Jens Mortan við familju**

---


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Tann seinasti frá 1946



*Sendinevndin er komin til Keypmannahavnar. Vinstrumegin frá: Andreas Møller, skrivstovustjóri í danska forsætisráðnum, Rikard Long, Pól Petersen, Petur Mohr Dam, Nielsn Arup, ráðharraskrivari, Jóhan Poulsen, Jákup Fr. Øregaard, Kristian Djurhuus og Hilbert, amtmaður. Thorstein Petersen vantar á myndini*

**Poul Petersen, ið andaðist sunnudagin, var tann seinasti á lívi av teimum, sum samráddist um nýggja stjórnarskipan í 1946**

*Eirikur Lindenskov*

Poul Petersen var tann seinasti á lívi av teimum tingmonnum, sum vóru við til at samráðast um heimastýrislógina eftir seinna heimsbardaga. Hann var valdur á ting fyri Fólkaflokkin í Eysturoy tann 30. januar í 1940, og hann sat til valið í 1970, tá fólkafloksmenn í Eysturoy stilláðu upp havnarmannin, Jógvan Sundstein, sum varð valdur fram um Poul Petersen.

Í sendinevndini sum fór til Danmarkar at samráðast í januar 1946 vóru fyri Fólkaflokkin umframt Poul Petersen, Thorstein Petersen, bankastóri og varaformaður Fólkafloksins og Richard Long, lærari. Fyri Sambandsflokkin vóru Kristian Djurhuus, sýslumaður á Tvøroyri og Johan Poulsen, lærari á Strondum og Javnaðarflokkin umboðaðu Petur Mohr Dam, lærari og formaður floksins og Jákup Fr. Øregaard, keypmaður í Norðragøtu.

Poul Petersen var útbúgvin løgfrøðingur. Hann starvaðist eitt skifti sum sýslumaður í Klaksvík, og sat í Klaksvíkar sóknarstýri árini 1935-39. Hann starvaðist seinni sum fulltrúi í landsumsitingini frá 1951 – 1971.

Hann skrivaði bøkurnar, Ein føroysk bygd og bøkurnar Føroyar í søguni.

---

# Poul Petersen, ein álvarsamur politikkari

**Poul Petersen var "seriøsur" og partapolitiskt stríð var ikki hansara sterka síða, sigur Hilmar Kass, sum sat á tingi saman við Poul Petersen í skeiðnum 1966-70**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tann seinasti politikkarin, sum var við at leggja lunnar undir føroysku heimastýrislógina, Poul Petersen úr Funningi, andaðist sunnudagin 99 ára gamal. Seinastu 30 árini hann hevur livað sum pensionistur og hann hevur ikki verið so nógv frammi. Gav hann ikki søguligar bøkur úr av og á, so hevði hann næstan verið gloymdur. Men í samfull 30 ár sat hann á løgtingi í farnu øld og hann var við at taka tíðandi avgerðir fyri Føroyar.

Hilmar Kass er ein av teimum, sum upplivdu hvussu Poul Petersen var at arbeiða saman við. Tá Hilmar Kass varð valdur á ting í 1966 fór Poul Petersen, uttan at vita tað sjálvur, undir sítt seinasta skeið sum løgtingsmaður. Í Havn ella í Danmark gekk tá ein ungur grannskoðari, Jógvan Sundstein, og hevði ein tingmann í búkinum. Hann stillaði upp í Eysturoynni fyri fólkaflokkin í 1970 og vann á Poul Petersen, ein ósigur sum nívdi fast hjá hesum drivna politikkara norðan úr Funningi.

– Eg upplivdi Poul Petersen sum ein ávarsaman politikkara, sum var ógvuliga nærlagdur í politisku viðgerðini. Hann stríddist ikki nógv partapolitiskt, men gekk heldur eftir teimum málum, sum vóru fyri, sigur Hilmar Kass, sum í mong ár sat á tingi fyri Sjálvstýrisflokkin.

– Ein annan eginleika hevði hann eisini, sum er hentur hjá einum politikkara. Hann hevði sera gott minni. Hann mintist politiskar viðgerðin nógv ár aftur í tíðina og tað lætti um hjá okkum, sigur Hilmar Kass.

– Hann kom inn á ting saman við javnaðarmanninum J.Fr. Øregaard í 1940 og eg minnist, at teir fingu eitt blómutyssi í tinginum, tá teir høvdu sitið í 30 ár. Politiskt stóð hann eitt sindur í skugganum á partamanninum Hákun Djurhuus, sum var ein dominerandi maður, men Poul fór ikki lætt um sítt politiska arbeiði at teirri søk. sigur Hilmar Kass.

Poul Petersen var ógiftur og hann arbeiddi ein stóran part av ævini í Havn. Tó hevði hann ikki fastan bústað í Havn. Búði fyri tað mesta á pensinati, eitt nú á Hotel Føroyum.

---

# Vitandi maður

**Poul Petersen var ein av oddamonnunum í Fólkaflokkinum undir krígnum og eftir kríggið. Hann var maðurin aftan fyri uppskot hjá flokkinum um stýrisskipanina**

SJÁLVSTÝRISMAÐUR
*Eyðun Klakstein*

– Poul Petersen var ein vitandi maður, og hann visti altíð, hvat hann vildi.

Hetta sigur eftirmaðurin hjá Poul Petersen á tingi, Jógvan Sundstein, sum í 1970 og 1974 stillaði upp í Eysturoynni, um fyrrverandi tingmannin fyri Fólkaflokkin.

Páll Petersen varð valdur á ting fyrstu ferð 30. januar 1940, og hann sæt út í eitt næstu 30 árini.

Poul Petersen var formaður Fólkafloksins á tingi, tá flokkurin var í landsstýrinum – í fimtiárunum saman við Sambandsflokkinum og í sekstiárunum sum partur av sjálvstýrislandsstýrinum. Hann var eisini formaður í fíggjarnevndini fyrst í fimtiárunum.

Poul Petersen var partur av føroysku samráðingarnevndini, sum í 1946 og 1947 var í Keypmannahavn og samráddist um framtíðarstøðu Føroya.

### Sjálvstýrismaður

Poul Petersen myndaði saman við Thorstein Petersen og Rikard Long Fólkaflokkin undir krígnum og árini aftaná.

– Poul stóð fyri uppskotunum viðvíkjandi stýrisskipanini, sum Fólkaflokkurin hevði í krígsárinum og aftaná. Hann var ein veruligur sjálvstýrismaður, sigur Jógvan Sundstein.

Tað varð sagt um Poul Petersen, at hann var tann fólkafloksmaðurin, sum stóð Jóannes bónda næstur.

– Poul Petersen var væl lýddur í flokkinum og av øðrum. Hann var altíð siðiligur og sáttligur, sigur Jógvan Sundstein.

Poul Petersen var tann seinasti av politikarunum undir krígnum, sum var á lívi. Hann var ógiftur.



*Poul Petersen, tá vegasamband kom úr Funningsfirði til Funnings miðskeiðis í 80-unum*